


## KOMANDI TILTØK

Í nýggja árinum fer sendimaðurin og frú at bjóða sendifólkunum heim. Byrjað verður við norðurlendsku sendifólkunum. 14. januar verða tað sendiharrarnir úr Noregi, Svøríki, Finnlandi og Danmark, som koma á vitjan.

## NÝGGJUR FORSETI VELJAST Í SUMMAR

Ólafur Ragnar Grímsson, forseti, boðaði í nýggjársrøðu sínari frá, at hann ikki stillar uppaftur til forsetavalið, sum verður 25. juni 2016. Ólafur Ragnar Grímsson, ið er 5. forseti lýðveldisins, hevur tá verið forseti í 20 ár og er tann forseti, sum hevur sitið longst.

> *» Í Íslandi er bert eitt valumfar til forsetavalið og tí gerst tað valevnið, ið fær flestar atkvøður til valið 25. juni, forseti.«*

Ólafur Ragnar Grímsson boðaði frá í nýggjársrøðuni, at hóast hann leggur frá sær sum forseti, so vil hann fegin umboða landið og eisini gera alt tað, hann er mentur, at stríðast ímóti veðurlagsbroytingunum. Eisini vil Ólafur Ragnar Grímsson styrkja Arctic Circle, sum árligt forum fyri heimsins lond.

*Nýggjársrøða forsetans kann lesast her (á íslendskum) og her (á enskum)*

## ÍSLENDSKI BÚSKAPURIN TANN BESTI SEINASTU HÁLVA ØLDINA



*Mynd: Forsætisráðharrin flytur fram nýggjársrøðu sína.*

Íslendski forsætisráðharrin, Sigmundur Davíd Gunnlaugsson, nevndi í nýggjársrøðu sínari, at íslendski búskapurin er í dag tann besti, sum hevur verið seinastu hálva øldina. Hetta er ótrúligt, so skjótt vend er komin í búskapin. Vælferðin er økt munandi. Keypsorkan – tað sum íslendingar fáa fyri sína løn – er økt uml. 13% seinastu 2 ½ árini (hetta svarar til uml. 5,2% um árið).

Eisini kom forsætisráðharrin inn á ferðavinnuna (blm.: íslendingar rokna við, at tað koma uml. 1,5 mió. ferðafólk til landið í 2016 móti góðum 1,2 mió. í 2015), har m.a. nevnt varð, at tað var umráðandi at tryggja landið sum eitt forvitnisligt land at vitja, eisini í framtíðini. Hetta skal m.a. gerast við, at tað menniskja skapta umhvørvið – býirnir og bygdirnar – skal gerast meira áhugavert og meira dentur leggjast á tilfeingið, sum er í mentanini og søguni, ikki minst víkingaarvin.

*Nýggjársrøða forsætisráðharrans sæst her (á íslendskum)*



## LÍTIÐ ÁLIT Á BANKUM OG TÍ ALMENNA, MEN Á LØGREGLUNI

Nú er Ísland við at koma undan kreppuni, og fíggjarstøðan hjá landinum sær betri út. Hóast hetta, vísir ein álitiskanning, ið Marked and Media Research hevur gjørt, at 70,6% av teimum spurdu siga seg hava 'lítið' ella 'sera lítið' álit á íslendska bankakervinum. Eftir hetta liggja ávíkavíst Fíggjareftirlitið við 61,1% og stjórnin við 60,3%. Hóast hetta, er tað ein framgongd fyri álit á stjórnina, ið var niðri á 63% í 2014. Hinvegin hava heili 75,5% álit á løgregluni, sum er tað øki, íslendingar hava størst álit á. Næst kemur Háskóli Íslands við 64,6%, síðani koma Háskólinn í Reykjavík við 52,9% og Ríkisútvarpið við 49,2%.

*Les greinina her og sí fleiri hagtøl frá kanningini her*

### Samband


**Sendistova Føroya í Reykjavík**
Túngata 14
101 Reykjavík
+354 511 3200
reykjavik@tinganes.fo
www.tinganes.fo
Finn okkum á Facebook


## MÓTMÆLA AT LANDIÐ STUÐLAR TRÚARBÓLKUM FRAMUM ONNUR

Í Íslandi er lógarkrav at skráseta seg sum lim í einum trúarfelagi, og somuleiðis gjalda eitt árligt gjald at stuðla ávísa felagnum. Landið stuðlar trúar- og lívsáskoðanarfeløgum. Fram til 2009 kundi ein velja at stuðla Háskóla Íslands í staðin fyri einum trúarfelagi, og er trúarfelagið Zuism í Íslandi, stovnsett sum mótmæli, at ein skal verða skrásettur og stuðla einum trúarfelagi. Fyrst í desember vóru omanfyri 3.000 limir skrásettir í nýggja trúarfelagnum, sum lovar øllum limum at gjalda teimum lógarkravda stuðulin aftur.
Á heimasíðuni stendur, at trúarfelagið verður uppleyst, tá landið avtekur lógarkravið at skráseta seg og somuleiðis broytir allar lógir, ið geva trúarfeløgum fyrimun fíggjarliga ella á annan hátt, fram um aðrar felagsskapir.

*Les meira her og her*




# Ísland og Grønland

## GRØNLAND YNSKIR AT YVIRTAKA FYRISITINGINA AV LUFTRÚMINUM


Mynd: Íslendska luftrúmið (tað bláa)

Grønland ynskir at yvirtaka fyrisitingina av luftrúminum yvir Grønlandi. Orsøkin til hetta er m.a., at tað kann útvega Grønlandi fleiri arbeiðspláss. Tað er Anleggsnevndin hjá Inatsisartut (grønlendska løgtingið), sum hevur sett uppskotið fram um hetta. Anleggsnevndin skjýtur upp, at stjórnin setir seg í samband við donsku stjórnina fyri at byrja tingingar við Kanada og Ísland um at Grønland kann taka yvir fyrisitingina av luftrúminum yvir Grønlandi. Uppskotið hevur verið til aðru viðgerð og roknað verður við at tað verður samtykt við 3. viðgerð í byrjanini av 2016.

Anleggsnevndin leggur dent á, at ætlanin er ikki at yvirtaka ábyrgdina av eftirlitinum av luftrúminum, men bert fyrisitingina. Í 2014 kostaði tað 20,6 mió. DKK at hava eftirlit við

grønlendska luftrúminum, sum danski staturin og luftfarts organisatiónin hjá ST, ICAU, rindaðu.



Mynd: Inatsisartur (grønlendska løgtingið)

Íslendingar eru hinvegin ikki so spentir upp á møguligu broytingarnar. Samlaða luftrúmið, sum Ísland heldur eyga við er 5,5 mió. ferkilometrar. Íslendsku inntøkurnar av grønlendska luftrúminum eru 1,5 mia. ISK (uml. 80 mió. DKK) um árið, sum er 30% av samlaðu inntøkunum, sum Ísland fær av øllum luftrúminum. Missir Ísland hesar inntøkurnar, so kemur tað at hava við sær, at rindast má meira fyri at nýta tað, sum eftir er av íslendska luftrúminum.

Uppskotið hjá anleggsnevndini kemur til 3. viðgerð tíðliga í 2016.

*Meira um hetta sæst her (álit o.a. frá anleggsnevndini) og her (grein í KNR)*

## SKIFTIR GRØNLAND KÓS MÓTVEGIS ÁLBORG?




Í august í 2015 varð nýggjur stjóri settur í Royal Arctic Line. Verner Hammeken, sum áður hevur starvast í Maersk, hevur boðað frá, at 3 dótturfeløg í Álborg skulu seljast og 120 starvsfólk verða ávirkaði av hesum. Hetta verður m.a. gjørt tí, at Grønland skal venda sær móti útheiminum og tí ikki skulu verða bundin av einari støðishavn í Danmark.

Í løtuni eru vit í samráðingum um samstarv við eitt annað Norðuratlantiskt skipafelag, so vit kunnu sigla farm fyri hvønn annan. Roknað verður við, at henda avtala verður kunngjørd tíðliga í 2016.




Royal Arctic Line eigur at verða katalysator fyri búskaparligari menning í Grønlandi. Okkara uppgáva er at gera handilsviðurskiftini við restina av heiminum léttari og áhugavert at skapa arbeiðspláss í Grønlandi, sigur Verner Hammeken m.a.

Meira um hetta sæst her



## GRØNLAND YNSKIR AT RÍÐA Á FERÐAFÓLKA BYLGJUNI HJÁ ÍSLANDI

Nuuk vónar, at góða flogsambandið og betri og størri samstarv við íslendingar um marknaðarførslu, vil hjálpa til at fáa lut í íslendska ferðafólka boomið. Air Greenland hevur ætlanir um sjálvt at flúgva millum Ilulissat og Keflavík í 2016.

Grønlendsku ætlanirnar eru at tekkjast íslendsku ferðavinnusmiðunum, við at økja samstarvið við Ísland, við at marknaðarføra bæði londini sum eina pakkaloysn.

Sum er, koma 51% av ferðafólkunum, ið koma til Grønlands, úr Danmark.

*Meira um hetta sæst her*

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**